

www.oljan.fo

**Jan Müller** 01 - 08 - 2012

# Landsstýrið vil dagføra oljulóggávuna

Jarðfeingi og sakførarar sita í løtuni og gjøgnumganga lógarverkið, og vit koma at gera dagføringar av verandi oljulóggávu komandi árini. Miðjað verður móti at fremja dagføringarnar vónandi í tingsetuni, sum verður fram til komandi ólavsøku segði Johan Dahl, landsstýrismaður í oljumálum á løgtingi, tá ólavsøkurøða løgmans varð til umrøðu týsdagin. Tað varð tingkvinnan hjá Tjóðveldi, Kristina Háfoss, sum spurdi landsstýrismannin, hvat ítøkiliga verður gjørt fyri at broyta karmarnar í oljulóggávuni. Hon vísti á, at tað eru nógv ár farin, síðani oljulóggávan varð skrivað og helt fyri, at man hevur fingið nógva nýggja vitan síðani. Eg haldi sjálv, at har eru fleiri viðurskifti, sum kundu verið broytt, so tíðin er komin til at endurskoða hesa lóggávuna, segði tingkvinnan. Tað var annars løgmaður Kai Leo Johannessen, sum í síni røðu á ólavsøku nevndi núverandi boringina hjá Statoil, sum Føroya størstu íløgu nakrantíð og vísti á, at Føroyar skulu gerast ein miðdepil fyri frálandavinnuna.